FAROE Business Report
THE INTERNATIONAL REVIEW OF FAROE ISLANDS INDUSTRY AND TRADE



# FBR 2010. Meira umráðandi nú enn nakrantíð at samskifta sannförandi.

VIT ERU STOLT AV at kunna bjóða útflutningsfyritökum og stovnum ið umboða Föroyar úteftir at taka lut í Faroe Business Report 2010. Aftan á at FBR 2009 varð avlýst orsakað av óvissum ið gjördu tað ómöguligt at tryggja eina nöktandi útgávu, eru vit nú tilreiðar at halda fram við hesum týdningarmikla árliga tiltaki.

Saman við viðskiftarum og samstarvsfelögum kunnu vit uttan iva hækka tað annars longu virda dygdarstigið í FBR enn meira, ikki minst av tí at okkara starvslið hetta seinasta árið hevur nomið sær ökta yrkisliga og akademiska útbúgving innan fyrst og fremst virkissamskifti, almenn mál, og altjóða marknaðarföring.

Virkir og stovnar hava alt at vinna við at gagnnýta FBR. Hetta er ein skilagóður og búskaparliga munadyggur máti at tryggja at vinnusögur knýttar at Föroyum verða bygdar upp og hildnar livandi mitt í meldrinum av skiftandi tíðum.

FBR hevur leingi vakt ans og áhuga millum útlendskar lesarar. Einki annað árligt tíðarrit hevur sum FBR víst á og sagt frá hví föroyskar fyritökur og teirra vörur og tænastur kunnu vera verdar atlit, umhugsan og samhandil—og hví tær eisini kunnu vinna álit og fótafesti millum viðskiftarar.

**Lágur kostnaður í mun til virði:** Alt kostar, men ein og hvör ið kennir til FBR dugir at síggja hetta: prísurin fyri at *ikki* vera við kann skjótt nógvar ferðir uppviga tær fáu krónur tað kostar at vera við.

At taka lut í FBR er at hugsa frameftir—tað er at hjálpa keyparum og öðrum at skilja betur hví tín fyritöka, tænasta, ella vöra hevur uppiborið teirra áhuga. At fáa hetta gjört kostar lítið og krevur sera lítlan ómak av tykkum: vit hjálpa við öllum ið skal til fyri at effektivt varpa ljós á hóskandi evni í hvörjum einstökum föri. Vit hava drúgvar royndir, útbúgving og servitan innan júst hetta öki.

**Dömi: Alt hetta fyri einans 13.800 kr (u/mvg)**

- Munagóð kunning fyri tína fyritöku yvir eitt heilt ár;
- Tvær fylgjandi heilsíður í FBR við upplýsandi grein;
- Prentað útgáva og talgild versión (PDF);
- Leitivinarlig Internet útgáva (FaroeBusinessReport.com);
- Gott umhvörvi millum leiðandi fyritökur/stovnar;
- Hög innihaldslig og grafisk dygd, á góðum enskum máli, við sterkum og sigandi myndum;
- Greitt og sannförandi—fyritöka og hugtök í röttum höpi;
- Effektiv útbreiðsla í samstarvi við m.a. Uttanríkisráðið;
- Nógv frammi í sambandi við altjóða messur, ráðstevnur, handilsferðir v.m. umframt onnur hövi;
- Tykkara egnu eintök (50-150 stk.) at senda ella handa til kundar og onnur sambond.

**Sig frá nú:** At taka lut í FBR er at senda út eina greiða ábending um at fyritökan/stovnurin telist millum framstandandi föroyskar útflytarar, leiðandi veitarar, ella týðandi partar annars í okkara vinnu.

Tekna teg ella fá nærri at vita á 449627 ella send boð til fbr@PRnewsMedia.com; ella faxa inn á +44 845 053 1842. Tíðin bíðar ikki—sig frá ídag heldur enn ímorgin.

*Faroe Business Report—útgivin síðani 2005—hevur til endamáls at geva útlendingum við verandi ella potentiellum áhuga í föroyskum vinnulívi eina kenslu av hvat Föroyar eru, hvussu árið ið fór royndist, og hvörji útlini hjá okkara vinnulívi eru. Hövuðsvinnan verður lýst herundir fiskiveiði, framleiðsla, handil og tænastur; aðrar vinnur verða eisini lýstar, eins og nomið verður við infrastruktur, búskap, samfelagsbygnað, mentan og annað. Útgevari og framleiðari er PRnewsMedia.com (North Atlantic Information Services Spf), telefon 449627, email fbr@PRnewsMedia.com.*